# Snikkaraverkstaður

Hjúnini Páll og Jórun Petersen úr Kaldbak hava í 14 ár rikið Pálsstovu, sum verður nýtt til mangt og hvat. Gjøgnum árini er tað vorðið til nógv bingo, brúdleyp, føðingardagar og aðrar veitslu ella tiltøk



Fyri 15 árum síðani byrjaði Páll at byggja ein bygning, sum hann ætlaði skuldi vera hansara snikkaraverkstaður. Tí setti krepp og í dag er snikkaraverkstaðurin Pálsstova

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*

Tað, sum byrjaði sum ein snikkaraverkstaður, endaði við at blíva til Pálsstovu.

Beint áðrenn kreppan í nítiárunum tók seg upp, fór Páll Petersen, snikkari, undir at byggja ein snikkaravekstað. Men mest sum yvir nátt byrjaði kreppan, og nógv virksemið steðgaði upp. Bygningurin stóð innilokaður, men onki varð gjørt við hann afturat í eini tvey ár.

11. januar í 1992 høvdu Páll og Jórun verið gift í 25 ár, og tey høvdu onki stað at halda veitsluna í. Teimum kom til hugs at nýta tóma snikkaraverkstaðin, og væl bar til.

Og tað var nevniliga til hesa veitsluna, at hugskotið kom til teirra at nýta hølini til at leiga út til ymisk tiltøk.

Tey fingu tveir fyrispurningar um leigu til teirra egna silvurbrúdleyp, og tá fóru tey at umhugsa at fáa nyttuna burtur úr hølunum á hendan hátt.

Tey keyptu og gjørdu síðani tað, sum skuldi til fyri at hølið kundi leigast út, og áhugin vísti seg at vera stórur.

Fyrstu tíðina varð hølið millum annað nýtt til ungdómshugna hjá Ebenezer, har samkoman leigaði hølini til at skipa fyri hugnakvøldum fyri teirra ungdóm.Og tá kom hugskotið til navnið Pálsstova fram.

– Tað vóru tey ungu í Ebenezer, sum komu við navninum. Tað vóru ikki vit, greiða tey bæði Jórun og Páll frá.

Seinni byrjaðu feløg at venda sær til teirra, tí tey ætlaðu at skipa fyri bingo. Og ikki munnu nógvir dagar fara burtur ímillum, har lýsing í útvarpinum um bingo í Pálsstovu ikki er at hoyra.

## 200.000 bollar

Í dag eru tað seks fastir leigarar, sum leiga hølið hvørja viku til bingo. Men so hava tey eisini føðingardagar, brúdleyp og ervi í hølunum.

Tað eru tey somu feløgini, ið hava bingo einaferð um vikuna, og Páll og Jórun plaga altíð at taka eina hond við. Jórun hjálpir ofta til við upplesnaðinum. Tey bæði gera kaffi og syrgja fyri, at



*Pálsstova eru eini snotilig høli, har tiltøk av øllum slagi kunnu vera. Hetta kvøldið skipaðu Kyndlastuðlar fyri bingo*